# Eitt slóðbrótandi tiltak

**Vikuskiftið 21.-22. august var fyri fyrstu ferð hildin ein festivalur fyri teimum menningartarnaðu. – Í øllum hinum londunum í Evropa, eru nógvir slíkir festivalar hvørt summar, men her hevur einki verið. Okkum manglar festivalar fyri tey menningartarnaðu. Tí valdu vit at skipa fyri Teitis festivalinum, sigur Jóhan á Plógv, fyrireikari**

TEITIS-FESTIVALUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*M's Bluesband spældi á Teitis-festivalinum um vikuskiftið*

Vikuskiftið 21.-22. august var eitt slóðbrótandi vikuskiftið. Í øllum førum fyri tey menningartarnaðu í Føroyum, sum fyri fyrstu ferð í søguni kundu fara á sín egna festival. Festivalar fyri menningartarnað eru vanligir í øllum londunum í Evropa, men á hesum økinum hava vit higartil verið eftirbátur. Tað er nú broytt.

– Vit hildu absolut, at tað manglaði ein festivalur til tey mennigartarnaðu í Føroyum. Tey skulu sleppa at hava tað stuttligt saman og vísa, at tey eisini duga ymiskt handverk, greiðir Jóhan á Plógv, fyrireikari frá.

Tiltøkini vóru nógv. Har vóru tónleikaframførslur við føroyskum og útlendskum bólkum, málningaframsýningar og málningasøla, karusell, hoppiborg og verkstaðið Vón var eisini og sýndi fram ymiskt, sum tey gera.

## Betri næstuferð

– Vit vóru sera óheppin við veðrinum, tí leygardagurin var keðiligur, við nógvum grovum ælum. Tað oyðilegði eitt sindur, tí nógv fólk fór heim, og kom so ikki aftur, sigur Jóhan á Plógv.

Hann sigur, at tað ikki komu so nógv fólk, sum hann hevði væntað. Kanska orsakað av veðrinum, kanska tí tiltakið var ov illa lýst.

– Eftirsum hetta var fyrstu ferð, at vit hava skipað fyri einum tílíkum festivali, eru longu nú nógv ting, ið vit halda okkum kunna bøta um til komandi festival. Til dømis tað, at søkja eftir stuðlum í góðari tíð. Vit vóru nakað sein at søkja í ár, og tað hevði við sær, at vit ikki fingu nakað serligt. Tískil vóru ikki pengar til stórar lýsingarherferðir, greiðir Jóhan frá. Vantandi stuðulin minkaði eisini um undirhaldið á festivalinum.

– Eg hevði sett meg í samband við nakrar danskar gyklarar, sum vóru áhugaðir í at koma higar. Men av tí, at vit vóru so sein at søkja um stuðul, og tað altíð gongur long tíð áðrenn svarið kemur, dróg tað ov leingi út. Tey vórðu noydd at siga ja til okkurt tiltak í Danmark í staðin, tí hetta gjørdist ov óvist, sigur Jóhan.

Hann heldur fram, at tá tey fóru undir fyrireikingarnar av Teitis festivalinum, vistu tey ikki av, at Summar festivalurin í Klaksvík skuldi vera vikuskiftið frammanundan. Hann sigur, at høvdu tey vita tað, so høvdu tey allarhelst lagt teitis okkurt annað vikuskiftið.

– Orsøkin til, at tað ikki vóru so nógv fólk, kann jú eisini vera, at fólk eru troytt av at ganga á festivalar. Nógv fólk var í Klaksvík, og tað hevur kanska verið nakað nógv at koma til Havnar á festival vikuskiftið eftir eisini, sigur Jóhan.

– Tí hava vit avgjørt, at flyta teitis festivalin komandi ár. Hann skal ikki liggja beint eftir Summar festivalin, staðfestir hann. Komandi ár ætla fyrireikararnir eisini, at teitis bert skal vara í ein dag, ístaðin fyri tveir.

– Tað vísti seg, at tað vóru fleiri fólk leygardagin enn sunnudagin. Tey flestu vóru leygardagin, og tey hava ikki tímað at komið aftur dagin eftir. So komandi ár ætla vit bert at hava ein dag, sigur Jóhan.

## Ov fá tilboð

Jóhan á Plógv heldur, at tað sum heild eru ov fá tilboð til tey menningartarnaðu í Føroyum.

– Vit "normalu" hava so óendaliga nógvar møguleikar. Tað hava tey ikki. Hugsað vit um, at roynt nú verður at integrera tey í samfelagið, við at geva teimum íbúðir o.a., so haldi eg ikki, at tað eru nóg mikið av sosialum tilboðum til teirra. Tey gerast lætt einsamøll, tá tey búgva fyri seg sjálvi. Teitis var so ein roynd at bøta um tað. Her kundu tey møtast í dansi og í einum listarligum tiltaki og hugna sær saman, sigur hann.

Hann sigur, at Ælabogin, M'as Blues Band, eitt íslendskt orkestur nevnt Blikandi stjørnur og eitt danskt orkestur nevnt Øl, Popcorn og pølser spældu á Teitis.

– Vit funnu útlendsku orkestrini á netinum, og vit ætla okkum serliga at hava kontakt við tað íslendska orkestrið, tí tað kundi verið sera stuttligt at sent føroysk orkestur við menningartarnaðum til Íslands at spæla. Tey sleppa ikki til Danmarkar, tí har er kravið, at tey menningartarnaðu spæla sjálvi. Tað gera tey ikki í Føroyum, og tí satsa vit uppá Ísland, greiðir Jóhan frá. – Eg trúgvi, at tað hevði verið eitt alletiders upplivilsi hjá t.d. Emmu. Hon hevði livað uppá tað í fleiri ár. Men hetta eru alt fjarar ætlanir, sigur hann.

## Stór gleði

Jóhan sigur, at tey menningartarnaðu øll vóru sera glað fyri Teitis festivalin.

– Tey eru so óalmindiliga løtt at gleða. Tey eru veruliga takksom fyri øll tílík tiltøk. So nú fara vit undir at skipa komandi festival. Hesuferð hava vit eitt heilt ár, og nú hava vit eisini gjørt okkum nakrar royndir. Tað er eitt stórt arbeiði og tað fer at taka tíð, áðrenn hetta verður ein integreraður festivalur. Men tað er í øllum førum ætlanin, at hetta skal vera eitt afturvendandi tiltak, sigur Jóhan á Plógv at enda.





*Eisini vóru gestatónleikarar. Úr Íslandi kom bólkurin »Blikandi stjørnur« og úr Danmark »Øl, pølser og popcorn«*



*Neyðugt var at kroka undan grovu ælunum, men lagið var gott hóast tað*



# Steðgið kirkjuligum brúðarvígslum



**Kirkjan eigur at gevast við at víga fólk. Virðingin fyri hjúnalagnum er farin. Politikararnir hava tikið meira og meira yvir, og brúðarvígslur hava fyri mong ongan týdning longur, sigur føroyskur trúboðari, sum beinleiðis mælir kirkjuni til at gevast við brúðarvígslum, sum støðan í dag er**

BRÚÐARVÍGSLA
*Edvard Joensen*

– Tað gevur onga meining longur, at geva lyftið fyri altarinum í kirkjuni, at tvey vilja liva saman í viðgongd og mótgongd inntil deyðin ger skilnað, tá ið talið økist av hjúnum, ið eftir styttri ella longri tíðarskeið fara frá hvørjum øðrum. Og samstundis sluppu vit undan tí, sum nú pikkar á kirkjudyrnar, nú teir verðsligu mynduleikarnir við tvingsli leggja seg út í kirkjunnar innaru viðurskifti, at víga tvey av sama kyni.

Tað heldur John Myllhmar, trúboðari, sum beinleiðis mælir kirkjuni til at sleppa brúðarvígsluni, nú virðingin fyri hjúnalagnum, sum innskrivað er í Halgubók, kortini er farin, sum hann tekur til.

Hann heldur, at eitt hóskandi høvi at tikið av kirkjuligu brúðarvígslurnar hevði verið, tá kirkjan verður yvirtikin.

John Myllhamar vísir á, at áður varð hjúnavígsla hildin at vera ein heilag gerð, sum fór fram í Guðs húsi.

Í dag halda fólk ikki so nógv um hetta meira, sigur hann. Hann sigur seg kenna dømi um, at fólk beint eftir at vera gift hava sagt, at tey meta ikki hjúnabandið hægri enn pappírið, tað er skrivað á.

– Tí gevur tað onga meining longur, at geva lyftið fyri altarinum í kirkjuni, at tvey vilja liva saman í viðgongd og mótgongd inntil deyðin gerð skilnað, tá ið talið økist av hjúnum, ið eftir styttri ella longri tíðarskeiði fara frá hvørjum øðrum. Og samstundis sluppu vit undan tí, sum nú pikkar á kirkjudyrnar, nú teir verðsligu myndugleikarnir við tvingsli leggja seg út í kirkjunnar innaru viðurskiftini, at víga tvey av sama kyni, sigur John Myllhamar, trúboðari.

## Kirkjan í stríð við seg sjálva

Tað eru tvinnar orsøkir til, at hann hevur so greiða støðu til hetta málið, sum hann hevur, sigur John Myllhamar.

Fyrsta orsøkin til hesa støðu hansara er, sigur hann, at nú ein og hvør átrúnarlig rørsla hevur fingið myndugleika at víga fólk, metir hann hetta at hava minkað um tað álvara og ta hátíð, sum ein brúðarvígsla hevur verið.

Onnur grundin er, sigur John Myllhamar, at tað er, sum hann tekur til, »fullkomuliga absurd og gagg gagg«, sum politiskir myndugleikar í okkara grannalondum nú við lóg vilja troðka inn á kirkjuna.

Hann metir kirkjuna í dag at vera ov veika at standa móti trýsti. Og orsøkirnar til tess heldur hann vera so ymiskar. Tær kunnu vera líkasæla ella ótti fyri at gerast ópopulerur, heldur hann. Ella í tríðja lagi, at kirkjuligi myndugleikin er meira upptikin av politiskum enn av krkjuligum virksemi.

– Enn hava vit tíbetur í Føroyum ein kirkjuligan mynduleika, ein biskup, sum torir at siga nei til sovorðið. Men vit vita ikki hvat framtíðin bjóðar, tí vit hava sanniliga eisini í Føroyum ein sterkan politiskan myndugleika, sum við lív og sál berjist fyri at sekularisera kirkjuna, eitt nú við at hon skal fylgja londunum kring okkum. Um teir ikki vága at taka hetta í einum takið, so verður tað gjørd í stigum, sigur John Myllhamar.

Sum er, talar alt fyri, at kirkjan í framtíðini skal tvingast at víga tvey av sama kyni hjún at vera. Verður tað gongdin, er grundarlagið fyri Guðs skaparorning, har hann skapti okkum sum kall og konu, tikið burtur. Og tí kemur kirkjan í stríð við seg sjálva, sigur hann.

Kirkja merkir kyriakón (tað, sum hoyrir Harranum til). Hon byggir tí á ævigar sannleikar og ikki á politiskar, har sannleikin ofta er ein í dag og ein annar í morgin.

John Myllhamar heldur, at avtøka av brúðarvígslu í kirkjuni vildi forða fyri óneyðugum stríði í kirkjuni við prestar, hvørs samvitska og sannføring sýtir teimum eitt nú at víga samkynd.



*Við teimum broytingum í hugsunarháttinum hjá fólki og uppílegging frá politiskum myndugleika í kirkjulig viðurskifti, er tíðin komin til at taka kirkjuliga brúðarvígslur av, heldur John Myllhamar, trúboðari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Kollvelting

John Myllhamar ásannar, at hetta er sera kollveltandi, hann kemur við. Men lítið kollveltandi í mun til tað, sum fram er farið seinastu tíðina og ivaleyst eisini fer at koma í framtíðini.

Í fyrstu syftu vil tað kennast sum stórur missur fyri okkum, sum hávirða kirkjunnar gomlu traditiónir, at skulu leggja av kirkjuliga brúðarvígslu. Ein sið, ið ikki finnist aldur á. Eisini er tað spell fyri tey hjún, sum enn taka hjúnabandið í álvara, og sum veruliga meina tað, tá ið tey geva hetta lyftið fyri Guði og monnum. Og nøkur eru tey tíbetur enn. Men júst fyri at virða teirra guðgivna lyfti, er rættast at avtaka hendan sið, heldur John Myllhamar, trúboðari.

Hann vísir á, at fyri at fremja tað, sum rætt er, er ofta neyðugt at gjalda høgan prís. Og hann er púra sannførdur um, at hetta sum frá líður fer at tæna kirkjuni best.

Hetta er ikki nøkur provokatión, men meint í ramasta álvara, sigur hann. Verður givið víðari til umhugsunar hjá okkum øllum. Ikki sum álop ella dómur yvir nakran.

– Tað ber heldur ikki til, tí nærum hvør einasti okkara er beinleiðis ella óbeinleiðis raktur av teimum vanlukkum og sorgarleikum tað er, tá eitt heim fyri og annað eftir verður lagt í oyði. Slíkt kann ein kirkja ella samkoman ikki »bagatellisera«, men eigur at taka í størsta álvara, sigur hann.

John Myllhamara sigur, at hann metir, at tíðin er farin frá brúðarvígslu í kirkjuni, sum ein heilag gerð. Tí eigur brúðarskørið at flytast úr kirkjuni yvir í bý- og bygdaráðssalin, so at uppgávan í framtíðini bara liggur hjá borgarstjóranum á staðnum. Hendan broyting átti at verðið gjørd, nú kirkjan verður yvirtikin, og framdar verða møguligar bygnaðarbroytingar.